www.oljan.fo

Jan Müller 30 - 08 - 2012

Oljufund kann slóða fyri nýggjum Airbussi

Eitt oljufund á føroyska landgrunninum kann av álvara geva Atlantic Airways luft undir veingirnar og vera eitt sera gott íkast til at keypa enn eitt Airbus flogfar. Eitt fund fer nevniliga at skapa enn meira ferðslu millum framtíðar boripallar og land og millum Føroyar og útlandið. Tað heldur nýggi marknaðarstjórin hjá flogfelagnum, Allan Skaalum. Sum ein av sínum fyrstu uppgávum, síðani hann tók við starvinum hevur Allan Skaalum lagt leiðina til altjóða oljumessuna í Stavanger, saman við nevndarformanninum Bjarna Askam Bjarnason. Við einum modelli av nýggja Airbussinum í hondini sær nýggi marknaðarstjórin stórar møguleikar hjá Atlantsflogi at menna seg enn meira í kjalarvørrinum á einum komandi stórum olju- ella gassfundi. Og hetta eru ikki tær beru luftkastellir, sum hann her tekur fram. Flutningurin, sum er í løtuni við fólki frá og til boripallin Cosl Pioneer og víðari millum Føroyar og Norra, er ein ábending um, hvussu stórt hetta kann blíva, verður eitt fund gjørt og tað verður bygt út til framleiðslu. Vit síggja longu nú, hvussu nógv verandi oljuvirksemið skapar av flutningi hjá Atlantsflogi. Her er bæði talan um sáttmálan við Statoil at flyta oljufólk við tyrlu og flogfari, og haraftrat kemur flutningurin av eitt nú føroyskum handverkarum, ið arbeiða í norsku oljuvinnuni. So ein kann væl siga, at oljuvirksemi heima og úti hevur stóran týdning fyri flogfelagið, og hvør veit um ikki hetta virksemið kann vera við til at skapa grundarlag undir at keypa enn eitt Airsbusflogfar. Bjarni Askam Bjarnason, nevndarformaður í Atlantic Airways heldur, at gongdin, sum økta oljuvirksemið her heima og í grannalondunum hevur við sær, sær ómetaliga spennandi út fyri felagið og ivast hann ikki í, at eitt oljufund í Føroyum fer at skapar nýggjar og spennandi møguleikar fyri flogfelagið. Myndir Allan Skaalum, nýggi marknaðarstjórin hjá Atlantic Airways á oljumessu í Stavanger. Nevndarformaðurin í Atlantsflogi, Bjarni Askam Bjarnason og Johan Dahl,

landsstýrismaður í olju- og flogferðslumálum á føroyska básinum á oljumessuni í Stavanger. Teir báðir Atlantsflogmenninir saman við Petur Joensen og Meinhard Eliassen frá Jarðfeingi Eli Lassen, stjóri í ASB gevur Allan Skaalum góð ráð Hýrurin er góður Myndatøka - oljan.fo/Jan Müller